


Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 36 00 00, Faks 36 00 01, meginskrivstovan@naerverk.fo

# Leiðari til Búskapardeildina

## Dugir tú at ansa eftir bleytu virðunum?

Nærverkið er ein samansettur stovnur við stórum búskapi. Tí krevur tað eitt gløgt høvd við hepnari hond at stýra hesum – er tað tú?

Nærverkið er ein umfatandi stovnur, sum hevur ábyrgdina av fjølbroyttum tilboðum til bæði børn og vaksin. Vit hava brúkarar kring alt landið, sum hava tørv á umsorgan, røkt, stuðul og heilsufremjan. Talan er tískil um ein stovn, sum tekur sær av einum stórum parti av bleytu virðunum her í Føroyum.

Búskapardeildin er ein nýggj deild í Nærverkinum. Høvuðsuppgávurnar eru at taka sær av fíggjarstýring, játtanareftirliti, roknskaparhaldi og lønaravgreiðslu við øllum teimum avbjóðingum, sum hetta inniber bæði inneftir í Nærverkinum og úteftir til samstarvspartar, myndugleikar v.m.

Tú fært ábyrgdina av at uppbyggja, menna og leiða hesa deildina, og tú skalt tí duga at bróta upp úr nýggjum og bøta um og seta í verk tær fyriskipanir, ið eru galdandi. Deildin hevur tvørgangandi virkisøki. Tú fært sostatt stóra ávirkan og kemur dagliga í samband við spennandi fólk, sum brenna fyri sínum yrki.

Nærverkið umsitur uml. 460 milliónir krónur árliga og fevnir um uml. 1400 starvsfólk kring landið. Tú skalt tí hava góð evni til at samstarva við deildir og stovnar og stýra einum samansettum búskapi. Tú verður partur av leiðslubólkinum í Nærverkinum, har tú kemur at arbeiða saman við leiðarunum á hinum deildunum í Nærverkinum.

Títt arbeiðspláss verður á Argjum í nýggju hølunum hjá Meginskrivstovuni. Her leggja vit dent á, at øll skulu kenna seg væl, og at tænastan er í hásæti, bæði tá tað snýr seg um starvsfólk og viðskiftafólk. Góðir møguleikar eru fyri menning og eftirútbúgving.

Leiðarin fyri Búskapardeildina hevur beinleiðis tilvísing til stjóran í Nærverkinum.

**Vit vænta:**

- at tú hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni og møguliga eftirútbúgving
- at tú hevur hollar leiðslu- og starvsroyndir
- at tú hevur kunnleika til KT sum arbeiðsamboð
- at tú kennir til almenna fyrisiting

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.
Uppýsingar um starvið fáast við at venda sær til Nærverkið, Meginskrivstovuna á telefon 360000 og tosa við Mary í Garði, stjóra.

Starvið verður sett sum skjótast. Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

**Nærverkið**
Argjavegur 26, Argir
Postsmoga 3037, 110 Tórshavn
Stílað: **Mary J. í Garði, stjóri**
Tlf. 360000, faks 360001

**Umsóknarfreist: Fríggjadagin 14. mars 2008.**

Lesið meira á www.naerverk.fo

sansir.fo

**www.naerverk.fo**

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# MÁLSVIÐGERI

## til Almannastovuna

**Á økisdeildini í Havn er eitt starv leyst at søkja.**

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum, at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og í serligum førum vísa áheitanum til serdeildir á stovninum.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá málsviðgerunum eru hesar**

- Vegleiða borgarum um rættindi og skyldur
- Útrokna og ávísa veitingar
- Skriva játtanarskriv
- Journalisering
- Taka ímóti viðskiftafólki og taka telefonina
- Taka avgerðir í ávísum málum
- Loysa aðrar fyrifallandi uppgávur.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**

- Skrivstovuútbúgving, merkonom, HH ella onnur viðkomandi útbúgving og royndir
- Góður kunnleiki til KT
- Góður málsligur førleiki

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Starvið er flokkað í triðja lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri upplýsingar**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Rúna Rasmussen, deildarleiðara, tel 35 35 70.

**Umsóknir**
Sendið umsókn við avriti av prógvum o.ø. til:
Almannastovuna, Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096, 110 Tórshavn.

**Freist at søkja**
Umsóknarfreist er fríggjadagin 29. februar 2008 kl. 12.00.

KREA

# HVS HANDVERKARAR

## TÓRSHAVN RUNAVÍK



Vit sóknast eftir handverkarum til deildir okkara í Havn & Runavík at byrja skjótast gjørligt…

**Vit bjóða tær**
eitt spennandi starv og áhugavert arbeiðspláss við avbjóðingum, har vit raðfesta tænastu, góðsku og gott handverk í øllum tí, vit gera.

Tú verður partur av vælvirkandi virki okkara við nógvum góðum og dugnaligum starvsfólkum.

Sum handverkari á deild okkara í Havn ella Runavík fært tú góðar arbeiðsumstøður og kemur at arbeiða sjálvstøðugt og soleiðis geva títt íkast til virksemi okkara.

**Vit vænta,**
at tú ert nærlagdur, ágrýtin og røkin og setir gott handverk í fremstu røð. Tað er ein fyritreyt, at tú hevur sveinabræv og/ella hevur royndir innan HVS. Løn og setanartreytir sambært avtalu.

Starvið verður at seta sum skjótast – fyrispurningar í Havn: Torbjørn Hansen á torbjorn@demich.fo ella tel 30 93 10. Fyrispurningar Runavík: Jørgin Jakobsen á jorginj@demich.fo ella tel 23 23 80.

SOZO



Demich
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn

tel +298 30 93 10
fax +298 30 93 11
demich@demich.fo
www.demich.fo

demich